B68-GÍ

2-5 (1-1)
1-0: Marlon 3
1-1: Alexander Radosavljevic 3
1-2: Henning Jarnskor 55
2-2: Marlon 59
2-3: Henning Jarnskor 60
2-4: Alexander Radosavljevic 75
2-5: Alexander Radosavljevic 88

Dómari: Lassin Isaksen (KÍ)

B68

1	9-(17)	0-0	Magnus Poulsen
3	2-0	0-0	Janus Thomsen
6	9-2	1-0	Marlon
7	9-0	0-0	Finn Mørk
8	8-0	0-0	Jákup Djurhuus
*13	4-1	0-0	(Aksel Højgaard, 82)
9	7-6	2-0	Marcelo
10	9-0	2-0	Fróði Benjaminsen, liðskip.
11	7-0	1-0	Sámal Erik Hentze
*4	8-1	1-1	(Øssur Jacobsen, 36)
14	9-0	2-0	Signar Johannesen
*18	1-0	0-0	(Bogi Petersen, 82)
15	9-0	0-0	Olaf Højgaard
16	8-4	1-0	Jan Petersen

GK: Jan Petersen 69
RK: Eingin
Venjari: Bjørn Krogh

GÍ

1	9-(15)	0-0	Sunvard Joensen
2	9-3	0-0	Bartal Eliassen
3	9-4	0-0	Henning Jarnskor
5	2-1	0-0	Poul Ennigarð
7	9-3	1-0	Magni Jarnskor, liðskipari
8	9-0	2-0	Pauli Jarnskor
*4	7-1	0-0	(Erland Tvørfoss, 79)
9	7-1	2-0	Súni Olsen
10	8-3	1-0	Sámal Joensen
11	9-1	0-0	Jóan Petur Olsen
14	2-3	1-0	Alexander Radosavljevic
17	7-0	0-0	Leivur Hansen

GK: Alexander Radosavljevic 63
RK: Eingin
Venjari: Johan Nielsen

Hondbóltsskúlin 1999 í Klaksvík

Hondbóltsfelagið Neistin skipar nú 6. árið á rað fyri summartiltaki fyri ungdómsleikarar. Summartiltøkini verða nevnd »Vit Neistar«. Tiltøkini hava higartil verið:

1994: Ferð til Partille nær Göteborg. Heimsins største hondbóltskapping. 80 neistafólk.

1995: Hondbóltsskúli í Trongisvági. 90 neistafólk.

1996: Ferð til Partille. Hetta var metárið fyri Partille Cup við 10.500 luttakarum. 135 neistafólk vóru við, og Neistin var størsta felag uttan fyri Svøríki.

1997: Hondbóltsskúli í Hoydølum og í Vestmanna. 170 neistafólk. Harumframt vóru fýra lið til Dronninglund Cup.

1998: Ferð til Partille. 90 neistafólk.

1999: Hondbóltsskúli í Klaksvík. 130 neistafólk. Seinni í summar fara trý lið til Dronninglund Cup.

130 fólk á skúla í ár

Dagarnar 25. til 29. juni skipar Neistin fyri Hondbóltsskúla '99 í Klaksvík. 130 neistafólk fara at leika og venja hondbólt og annan ítrótt. Leikararnir verða býttir eftir aldri, men gentur og dreingir venja saman.

Hondbóltsskúlin fer at brúka KÍ-høllina, svimjihylin, fimleikahallirnar í skúlanum á Ziskatrøð og uttanduraøkini í skúlagørðunum.

Sunnukvøldið fara leikararnir at taka hondbóltsmerkini. Síðani 1995 hava bronsu-, silvur- og gullmerkini hjá Dansk Håndboldforbund verið brúkt. Harumframt eru tvey onnur merki gjørd til aldursbólkarnar niðan fyri bronsumerkið. Tey merkini kallast »hondbóltsmerkið« og »pilta/pinkumerkið«.


Venjarar á skúlanum vera úr Neistanum: Svanna Hanusardóttir, Kári Mortensen, Jón Kragesteen, Vár í Ólavsstovu, Gunleyg Berg, Djóni Dalsgarð og René Christensen (sum skal venja 1. deild kvinnur komandi ár).

Úr Stjørnuni: Rógvi Nielsen (venjari hjá 1. deild kvinnur).

Úr Danmark: Kenneth Jensen.

Luttakararnir sova í Ósaskúlanum og matgera og eta í skúlanum á Ziskatrøð.

T-shirts til allar luttakarar eru sponsoreraðar av Føroya Bjór.



Kári Mortensen verður ein av venjarunum á hondbóltsskúlanum hjá Neistanum í Klaksvík um eina viku
Mynd: Álvur Haraldsen

Støðan - 1. deild menn

Lið	D	V	J	T	F Í	S	Heima		Úti	
1. KÍ	**8**	**6**	**1**	**1**	**19-8**	**19**	**4-1-0**	**13-3**	**2-0-1**	**6-5**
2. GÍ	**9**	**6**	**1**	**2**	**22-15**	**19**	**5-0-0**	**16-6**	**1-1-2**	**6-9**
3. HB (M/S)	**8**	**5**	**2**	**1**	**14-6**	**17**	**3-1-1**	**10-6**	**2-1-0**	**4-0**
4. B36	**8**	**5**	**1**	**2**	**26-12**	**16**	**3-0-0**	**14-3**	**2-1-2**	**12-9**
5. NSÍ	**8**	**4**	**3**	**1**	**10-5**	**15**	**3-2-0**	**7-1**	**1-1-1**	**3-4**
6. B68	**9**	**4**	**2**	**3**	**15-17**	**14**	**1-1-2**	**5-7**	**3-1-1**	**10-10**
7. B71 (U)	**8**	**2**	**1**	**5**	**12-18**	**7**	**2-0-1**	**9-3**	**0-1-4**	**3-15**
8. VB	**8**	**1**	**2**	**5**	**6-12**	**5**	**1-2-1**	**4-4**	**0-0-4**	**2-8**
9. ÍF	**8**	**1**	**1**	**6**	**8-21**	**4**	**1-0-2**	**4-6**	**0-1-4**	**4-15**
10. Sumba	**8**	**0**	**0**	**8**	**9-27**	**0**	**0-0-4**	**5-15**	**0-0-4**	**4-12**

18 umfør. Eitt lið í Europa Cup fyri meistarar. Tvey lið í UEFA Cup kappingina, har av annað er liðið, sum vinnur steypakappingina. Eitt lið í Intertoto kappingina. Niðasta liðið flytir beinleiðis niður í 2. deild. Næstniðasta liðið spælir ein dyst á uttanveltaðum vølli móti nr. 2 í 2. deild um upp- og niðurflyting.

Bestu hagtølini fært tú í Sosialinum

Aerobic-instruktørur úr Danmark vitjar

Dagarnar 15.-18. juli verður høvi at fara á skeið hjá kenda danska aerobic-instruktørinum Tom Hoel.

Tað eru Guðrun, Annika og Lydia úr Fok, ið hava fingið hann til Føroya.

Tom Hoel undirvísir í kenda Fitness Club Scala í Keypmannahavn og er eigari av »Kazi-Tani Sports Consulting«.

Umframt at vera aerobic-instruktørur er hann eisini klænkiserfrøðingur, og eisini innan tað økið fer hann at halda fyrilestur, bæði í ítróttarhøllini á Kambsdali og í Runavík.

Um Tom Hoel kann sigast, at hann var við á Fitness Club Scala liðnum, sum vann »Aerobic på tværs« í 1996. Sama árið vann hann fríu rundina í Mr. Fitness, og eisini var hann silvurvinnari í aerobic fyri harrar. Í 1997 bleiv hann danskur meistari í aerobic fyri pør.

Tilmelding á tlf. 449955 (frá kl. 10-12 og 13-17.30), eftir arbeiðstíð á tlf. 443189, 441732 ella 441545, í seinasta lagi 1. juli.